# – Hevði neyvan ummælt, um eg búði í Føroyum



*Jógvan Isaksen fekk Heiðursgávu Landsins fyri sítt fjølbroytta virksemi innan føroyska bókmentaheimin. Her undir samkomuni í Norðurlandahúsinum mánakvøldið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Mánakvøldið fekk Jógvan Isaksen Heiðursgávu Landsins fyri sítt fjølbroytta virksemi innan føroyska bókmentaheimin. - Fysiskt eri eg niðri, men mentalt eri eg í Føroyum, sigur tann bersøgni útisetin, sum í løtuni skrivar ta fjórðu bókina um blaðmannin Hannis Martinsson**

## Samrøða



**Theodor E. D. Olsen**
blaðmaður
theodor@sosialurin.fo

Hann hevur skrivað fleiri enn 30 bøkur. Og fólk tíma at lesa hansara bøkur.

Vit tosa um Jógvan Isaksen, sum fyrr í vikuni fekk Heiðursgávu Landsins fyri sítt virksemi sum ummælari, ritstjóri, bókaútgevari og krimihøvundur.

Hann er føddur í Havn í 1950 og er vaksin upp við bókum.

- Eg havi altíð lisið nógv. Pápi las nógv, og báðir abbarnir lósu nógv, minnist Jógvan aftur á, og leggur afturat, at satt at siga las hann bøkur, áðrenn hann yvirhøvur dugdi at lesa.

- Foreldrini lósu nógv úr Sagnum og ævintýrum hjá Dr. Jakobsen, Føroyingasøgu og Robinson Kruso í týðing hjá Sverra Patursson, greiðir Jógvan frá.

Men hann leggur eisini afturat, at Davy Crockett-bøkurnar vórðu lisnar á tamb á donskum, og foreldrini lósu úr "Anders And", sum hann kallar tað, har tey umsettu beinleiðis úr donskum til føroyskt.

### Studenturin

Tí var tað kanska ikki so løgið, at Jógvan fór beina leið eftir tíðina í Hoydølum til Århus at lesa bókmentafrøði. Hann hevði tó ætlað, at hann skuldu verða verkfrøðingur, og í Hoydølum tók hann matematiskt studentsprógv. Men bókmentirnar vunnu á støddum og mongdum.

Tá í tíðini - í 1970 - varð kravt, at tey bókmentafrøðilesandi skuldu lesa eitt mál við síðuna av høvuðsfakinum. Jógvan valdi franskt, tí sum hann sjálvur sigur, so var hetta málið, hann dugdi minst.

Hann las franskt, til hann eitt ár seinni kvetti á stokkkinum, sum hann málber seg, tí tá var franskt ikki kravt longur.

Jógvan skrivaði magistaraserrit um skaldskapin hjá Heðini Brú.

- Tað varð ólukkusáliga drúgt. Fleiri hundrað síður, sigur Jógvan, sum minnist, at hann fekk eykaloyvi til at skrivað so langt spesiali. Hetta var tó ikki óvanligt tá í tíðini, tá tað meira enn so kom fyri, at lesandi skrivaðu serrit yvir 1000 síður.

Jógvan gjørdist mag. art. í 1982. Hetta er ein útbúgving, ið færri og færri taka í dag, nú tey Ph.D. lesandi fyri tað mesta hava yvirtikið henda lesturin, sum er munandi drúgvari enn cand.mag.-prógv. Talan er um eina granskaraútbúgving, har teir flestu magistararnir hava hildið fram á universitetinum.

Umframt at skriva um Heðin Brú, viðgjørdi Jógvan í lestrartíðini skaldskapin hjá m.ø. Janusi Djurhuus, Rikardi Long og Karsteni Hoydal. Av tí at næstan eingin á universitetinum í Keypmannahavn, hagar hann seinni flutti, skilti føroyskt, bað hann um eykaloyvi til allar sínar føroysku verkætlanir, og fekk hann Pola Djurhuus, sum undirvísti har tá, at vera eitt slag av vegleiðara hjá sær.

Jógvan sigur annars, at orsøkin til, at hann ikki var liðugur við útbúgvingina fyrr enn í 1982, var, at hann tað mesta av tíðini var "fløktur upp í" studentapolitikk, sum hann málber seg. Í Århus var hann virkin á universitetinum, og í Keypmannahavn sat hann í nógv ár sum formaður í MFS. Av tí sama fekk hann SU øll hesi árini, tí undantøk verða givin fyri langa lestrartíð, um hon er brúkt til t.d. studentapolitikk.

- Tá var bara vinstravongurin, greiðir Jógvan frá, tá hann verður spurdur, hvar hann kendi seg heima.

- Men tað var eisini rumblut, tí vinstravongurin klandraðist innanhýsis, fortelur Jógvan, og sigur óbeinleiðis, at hetta næstan gjørdi so at siga høgraveingin óneyðugan.

Jógvan gjørdi eisini vart við seg í vinstravendum tíðarritum. Longu sum umleið 25 ára gamal byrjaði hann at ummæla í Framanum, og seinni fór hann at senda Sosialinum ummæli og greinir.

Fyrsta bók hansara, "Føroyski mentunarpallurin" kom út í 1983, og Jógvan